

# 27 persónar handtiknir í oljugølu í Brasil

**Jógvan Hugo Gardar**

15.11.2014 - 16:57

Oljan.fo

Brasilianska løgreglan hevur handtikið 27 persónur í tí sum verður kallað størsta mutursgølan í landinum innan oljuvinnuna. Hetta skrivar tíðindastovan NTB. Talan er um snýt fyri milliardir av krónum í felagnum Petrobas. Fleiri útlendsk oljufeløg, harímillum Statoil og onnur norsk oljufeløgm hava tætt samstarv við Petrobas.

Fleiri av teimum sum eru handtikin hava leiðandi størv í Petrobas, men talan skal eisini vera um starvsfólk sum arbeiða hjá útlendskum oljufeløgum sum gera uppgávur fyri Petrobas. Løgreglan skal eisini hava lagt hald á virðir fyri umleið tvær milliardir krónur hjá 36 persónum og trimum feløgum sum eru undir illgruna í málinum.

NTB skrivar at fyrrverandi stjórin í Petrobas, Paulo Roberto Costa, skal Petrobas millum annað hava goldið stóra upphæddir í mutru til Javnaðarflokkin fyri at ávirka avgerðir sum stjórnin skuldi taka.

Costa situr sjálvur í varðhaldi heima hjá sær sjálvum, og samstarvar við løgregluna. Sambært hansara upplýsningum skal Petrobas minst hava brúkt 26 milliardir krónur til mutur seinastu tíggju árini.

Ongin dómur er fallin í málinum, men evni var uppi í forsetavaldystinum herfyri. Forsetin í Brasil, Dilma Roussef, hevur sjálv verið nevndarformaður í Petrobas. Bæði Roussef og fyrrverandi forsetin í landinumLuiz Inacio Lula da Silva eru undir illgruna um mutur, men bæði avvísa at tey hava tikið í móti nøkrum